-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

**TOYOTA CAMRY 2,2 GL** (Sýnaður 04-98)
**Skrás.:** 02-04-98
**Km.:** 24.000
**Prísur:** 218.600,- **Garanti****

**TOYOTA STARLET**
**Skrás.:** 18-10-95
**Km.:** 22.000
**Prísur:** 67.600,-

**TOYOTA CAMRY 2,2 XL** (Sýnaður 10-98)
**Skrás.:** 21-12-91
**Km.:** 80.000
**Prísur:** 98.600,- **Garanti***

**HONDA CIVIC 1,4 IS**
**Skrás.:** 01-10-96
**Km.:** 52.000
**Prísur:** 117.600,- **Garanti***

**TOYOTA CARINA 2,0 Gli**
**Skrás.:** 05-02-98
**Km.:** 19.000
**Prísur:** 154.600,- **Garanti****

**CITROËN ZX 1,9 DIESEL**
**Skrás.:** 12-12-96
**Km.:** 85.000
**Prísur:** 98.600,- **Garanti***

**TOYOTA CARINA 1,8 Gli**
**Skrás.:** 23-04-97
**Km.:** 23.000
**Prísur:** 138.600,- **Garanti***

**FIAT PUNTO 60 S** (Sýnaður 01-97)
**Skrás.:** 30-01-97
**Km.:** 42.000
**Prísur:** 79.600,- **Garanti***

**TOYOTA CARINA 1,6 STATION** (Sýnaður 02-99)
**Skrás.:** 18-06-90
**Km.:** 59.000
**Prísur:** 59.600,-

**FORD FIESTA 1,3** (Sýnaður 04-96)
**Skrás.:** 29-04-96
**Km.:** 104.000
**Prísur:** 66.600,-

**TOYOTA COROLLA 1,6 H/B GINZA** (Sýnaður 04-96)
**Skrás.:** 30-04-96
**Km.:** 34.000
**Prísur:** 112.600,- **Garanti***

**NISSAN MAXIMA 3,0 AUT. GEAR** (Sýnaður 12-99)
**Skrás.:** 15-12-87
**Km.:** 135.000
**Prísur:** 69.600,-

**TOYOTA COROLLA 1,6Xli H/B** (Sýnaður 10-96)
**Skrás.:** 31-10-96
**Km.:** 35.000
**Prísur:** 108.600,- **Garanti***

Støkkið inn á gólvið!

AVHEINTINGARTILBOÐ

**TOYOTA CAMRY 1,8 XL** (Sýnaður 11-97)
**Skrás.:** 28-01-87
**Km.:** 197.000
**Prísur:** 10.000,-

**HONDA CIVIC 1,5** (Sýnaður 12-98)
**Skrás.:** 01-06-86
**Km.:** 175.000
**Prísur:** 12.000,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKT-BILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

Sosialurin - 311820

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00





Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040



*Jóan Pauli Joensen, formaður í Grundlógarnevndini, beyð fjølmiðlunum til tíðindafundar í gjár, í sambandi við, at mevndin nú hevur fingið sína egnu heimasíðu. Samstundis nýtti hann so høvi, til at greiða miðlunum frá arbeiðinum í nevndini, sum hann sigur hevur verið mennandi fyri allar nevndarlimirnar, óansæð politiskan lit*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

# Grundlógin á netinum

*– Grundlógararbeiðið hevur verið ótrúliga mennandi fyri øll, sum hava tikið lut í arbeiðinum, og tað kann samanberast við eina eftirútbúgving fyri okkum, sum hava verið við, sigur formaðurin, Jóan Pauli Joensen, sum fyrrapartin í gjár beyð fjølmiðlum til tíðindafundar*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fyrrapartin í gjár beyð Grundlógarnevndin til tíðindafundar í Sjó- og vektarbúðini í Tinganesi.

Jóan Pauli Joensen, formaður, og Kári á Rógvu Olsen, skrivari í nevndini, tóku ímóti, og teir greiddu frá arbeiðsgongdini hjá nevndini umframt, at teir vildu kunna fjølmiðlarnar um, at nevndin nú hevur fingið sína egnu heimasíðu.

**Hugaligt arbeiði**

Jóan Pauli Joensen, nevndarformaður í Grundlógarnevndini greiddi frá nevndararbeiðinum, sum hann segði hevði verið serstakliga hugaligt.

Í nevndini sita politikarar úr øllum flokkum, saman við samfelags- og løgfrøðingum, og tað hevur víst seg at vera eitt sera vælegnað forum til gott kjak.

– Tað gevur eina breidd í kjakinum soleiðis, at vit fáa sera nógv sjónarmið á borðið, og tað hevur verið sera hugaligt arbeiði, sigur formaðurin.

Jóan Pauli greiðir frá, at teirra niðurstøða, tá nevndin byrjaði at arbeiða, var, at tey ikki bara kundu seta seg niður at skriva uppskot til eina Grundlóg, tí tað sum í eini slíkari lóg býr, skal helst vera væl og virðiliga gjøgnumarbeitt. So er spurningurin um tíðarbilið, sum Grundlógarnevndin hevur fingið er nóg langt, til at tey kunnu gjøgnumarbeiða tilfarið.

– Vit hava kortini mett, at vit kunnu gera eitt útkast til eina grundlóg, men tað skal so til almenna hoyring tá vit eru liðug við uppskotið, sigur formaðurin.

**www.grundlog.fo**

At gera eina grundlóg er tí ikki bara løtuverk og avgjørt ikki nakað, sum bara ein persónur far til uppgávu at fara í holt við.

Nevndin, sum situr við arbeiðinum, er tí ein stór nevnd, men kortini meta tey tað kortini neyðugt, at tey fáa upplýsingar frá fólki, sum hava áhugað fyri Grundlógararbeiðinum.

Í tí sambandinum og eisini sum ein kunning, hevur Grundlógarnevndin fingið sær eina heimasíðu á alnetinum.

– Har ber til at kunna seg um mangt og hvat, siga teir báðir og vísa m. a. á, at tað fer at bera til at síggja úrslitið hjá teimum 18 arbeiðsbólkunum, sum settir eru, so hvørt, sum tað verður liðugt.

– Men tað ber eisini til, at kunna seg um grundlógir hjá øðrum londum í heiminum, sigur Kári og greiðir frá, at ein tann mest áhugaverda Grundlógin í so máta er tann estiska.

– Hon er spildurnýggj so at siga, og tí er hon sera áhugaverd. Annars er tann danska eisini sera áhugaverd. Hon hevur víst í verki, at hon virkar og tí er hon altíð áhugaverd, hóast hon er rættuliga gomul, sigur Kári.

**Gevandi kjak**

Aðrastaðni á síðuni greiðir Jóan Pauli frá, at arbeiðið í Grundlógarnevndini hevur verið áhugavert.

Hann vísir m. a. á samstarvið við politikararnar, sum hevur verið mennandi. Serliga tí, at politikararnir hava dugað, at latið partapolitikkin verða liggjandi.

– Eftir tær fyrstu politisku markeringarnar, sum sjálvsagt áttu at koma, hevur tað verið ein fragd at arbeiða saman við teimum, kanska serliga tá vit hava kjakast um serstøk evni, sigur Jóan Pauli.

Kári tekur undir við honum og sigur, at tað í veruleikanum eru »casirnar«, sum hava verið tær mest gevandi, tí tá er nakað veruligt at taka fatur í, sigur Kári.

Fyri at geva nevndarlimunum enn betri førleika hevur nevndin eisini samband við fleiri føroyskar og útlendskar serfrøðingar, sum hava verið og sum koma at halda skeið fyri nevndarlimunum, sum ein partur av arbeiðinum.

– Og hetta er sjálvsagt eisini sera mennandi fyri okkum øll. Ikki bara politikararnar, sigur Jóan Pauli.

**Arbeiði seinkað**

Tá Grundlógarnevndin varð sett, fekk hon freist til fyrst í juni at vera liðug við arbeiði, men so verður ikki.

– Sum tað sær út í løtuni, so verað vit ikki liðug við arbeiðið til tíðina. Eg rokni við, at vit mugu biða um útsetilsi, so fáa vit tað, tí arbeiðið hjá okkum hongur saman við samráðingunum hjá landsstýrinum, sigur Jóan Pauli Joensen.

*Men nær roknar tú so við, at arbeiðið verður liðugt?*

– Eg rokni við, at vit vera liðug við eitt útkast um tað mundi tá freistin er og aftaná skulu so hoyringarnar verða. Hvussu tað verður gjørt er ikki greitt enn, men sjálvur vænti eg, at nevndin verður liðug við sítt arbeiði einaferð í heyst, sigur Jóan Pauli.

Tey, sum hava hug at lesa meir um Grundlógarnevndina, kunnu leita sær inn á www.grundlog.fo.





# Løgmaður fer at kanna Signar

JOHN JOHANNESSEN

Løgmaður hevur ikki havt stundir at lisið frágreiðingina frá løgtingsgrannskoðarunum, ið sigur, at Signar á Brúnni, landsstýrismaður, breyt landsins lógir, tá hann í juni játtaði pening til Sjónvarp Føroya uttan heimild.

Men løgmaður ætlar sær at lesa frágreiðingina gjølla. Og verður niðurstøða løgmans tann sama, sum tann hjá Bjørn á Heygum í fjølmiðlunum hóskvøldið, skal Signar á Brúnni frá.

Anfinn Kallsberg vísir á, at reglurnar fyri ábyrgd landsstýrismanna eru greiðar. Hevur landsstýrismaðurin brotið hesar reglur, eru sanktiónsreglurnar, sambært løgmanni, eisini greiðar.

Tjóðveldisflokkurin viðgjørdi seinnapartin í gjár, beint áðrenn blaðið fór til prentingar, málið. Á fundinum slapp Signar á Brúnni at greiða frá síni støðu.

Bæði Tjóðveldisflokkurin og løgmaður eru samdir um, at málið snýr seg um álit ella misálit á landsstýrið, og tí er tað álvarsamt.

# JFK Trol noktandi svar

*»Fram« og »Pelagos«, sum JFK Trol keypti herfyri, verða antin seldir ella fara teir á rækjuveiði*



ÓLAVUR Í BEITI

Herfyri søkti JFK Trol um loyvi at taka annað skip inn fyri teir báðar trolararnar »Fram« og »Pelagos« at fiska svartkjaft, men fiskimálaráðharrin hevur ikki gingið umsóknini hjá JFK Trol á møti. Í brævi til JFK Trol boðar fiskimálaráðharrin frá, at fyribils verður hetta ikki góðtikið, tí mett verður at veiðiorkan er nóg stór í løtuni.

Hanus Hansen, stjóri í JFK Trol, sigur við blaðið, at ætlanin er so antin at selja trolararnar ella at fara á rækjuveiði við teimum. JFK Trol hevur tvey rækjuloyvi.

# Sunnunáttin gerst ein tíma styttri



JOHN JOHANNESSEN

Sunnunáttin verður ein tíma styttri enn allar aðrar nætur í árinum. Orsøkin er, at klokkan eitt sunnunáttina skal klokkan førkast frá vetrartíð til summartíð. Tað merkir, at hon skal flytast ein tíma fram.

Avleiðingin av hesum verður, at tey, sum ætla sær út at mála býin reyðan sunnunáttina, fáa ein tíma enn vanligt til høvið.

Tó kunnu fólk ugga seg við, at tað eftir sunnudagin fer at verða ein tíma longur ljóst um kvøldarnar. Harafturat nærkast summarið og ljósu næturnar…

# Vænta friðaligan fund

*Hóast okkurt nos hevur verið at hoyrt frá onkrum einstøkum sambandsmanni, verður ikki roknað við uppreistri*

EDVARD JOENSEN
*frá landsfundi Sambandsfloksins í Øravík*

Tað er friðaligt í Øravík nú stutt undan fundinum, sum verður settur eftir, at blaðið er farið til prentingar. Og fyrireikararnir vænta eisini ein friðaligan fund.

Ein fyrrverandi tingmaður Sambandsfloksins, Atli Hansen, hevði herfyri onkrar atfinningar at formanni floksins, Edmundi Joensen. Men líkt er til, at hetta var eitt einsamalt gleps, sum ikki fær ta stóru undirtøkuna millum vanlig sambandsfólk.

Sambandsfólk, Tíðindablaðið Sosialurin hevur tosað við upp undir landsfundin í Øravík, siga seg ikki vita nakað um, at serlig misnøgd skal vera við floksleiðsluna. Fólk vænta ein stillan og siðiligan fund, sum fer at ganga, sum leiðslan vil hava hann.

Fyri tveimum árum síðan varð gjørd ein roynd at fáa formannin, Edmund Joensen, frá. Men Edmund vann atkvøðugreiðsluna ta ferðina, og sum skilst er einki, sum bendir á, at nakað slíkt verður aftur hesaferð.

Eftir skránni skuldi fundurin verða settur í gjárkvøldi klokkan hálvgum níggju. Men beint áðrenn blaðið fór til prentingar var eitt sindur ivasamt, um Smyril fór at klára suður til tíðina, tí veðrið var heldur keðiligt. Tað var væl av vindi av landsynningi, sum er ringasta ætt at koma suður. Og av tí, at tey flestu búgva norðan fyri Suðuroyarfjørð, varð væntað, at hetta fór at ávirka uppmøtingina.

Sjálvur aðalfundurin skuldi vera í gjárkvøldi, og í dag verður so politiskt orðaskifti. Seinnapartin fer ES tinglimurin hjá danska Vinstraflokkinum, Anne E. Jensen, at halda røðu fyri landsfundinum.

Landsfundur Sambandsfloksins í Øravík ár 2.000 endar við veitslu í kvøld klokkan 19.30.

Hesin landsfundur Sambandsfloksins er søguligur á tann hátt, at hetta er fyrstu ferð, pressan er boðin at verða við alla tíðina.




Páskaferð
...til Aberdeen

Frá Skírisdegi til 2. Páskadag

**Skenehouse Rosemount**



Íbúð til 2 fólk..........fyri hvønn **3.250,-**
Íbúð til 4 fólk..........fyri hvønn **2.865,-**
Íbúð til 6 fólk..........fyri hvønn **2.700,-**

**Skenehouse Holborn & Whitehall luksus íbúðir**

Íbúð til 2 fólk..........fyri hvønn **3.525,-**
Íbúð til 3 fólk..........fyri hvønn **3.250,-**
Íbúð til 4 fólk..........fyri hvønn **3.112,-**
Íbúð til 5 fólk..........fyri hvønn **3.195,-**
Íbúð til 6 fólk..........fyri hvønn **3.066,-**



Eykanætur úr kr. 248,- pr. persón.

**Útferðir frá Skenehouse**

**Hendingarrík ferð til Royal Deeside kl. 10.00 - 17.45**

Leiðin gongur inn í vakra Royal Deeside, landið hjá kongum og drotningum, og síðan 1856 summarbúðstaðurin hjá enska kongahúsinum. Vitja verður á Royal Burgh of Ballater, Balmoral Castle, Crathie Church og Lock Muick, har Drotning Victoria dámdi sera væl at vera. Ein spennandi túrur við kongiligari søgu.



**Kostnaður kr. 275,-**
Í minsta lagi 10 í ferðalagnum.

**Malt Whisky túrur kl. 09.30 - 17.00**

Ævintýrferð til byrjanina av Grampian fjøllunum eitt umráðið har, veðurlagið og jarðfrøðin passa so væl til whiskyframleiðsluna at helvtin av øllum tí skotska whisky'num verður framleitt her. Vitja verður á Ballindalloch Castle. Eigarin er MacPherson - Grant síðan 1546. Síðan verður farið til eitt vælkent whiskydistillari, har víst verður runt og greitt frá hvussu whiskyframleiðslan fer fram. Ein smakkur verður eisini at fáa. Vitja verður eisini í tí heimskenda whiskyhandilinum í Duffytown, fyri at síggja og smakka onnur fín malt-whisky sløg.

**Kostnaður kr. 275,-**
í minsta lagi 10 í ferðalagnum.



**Eisini er møguleiki at byrja hesa páskaferiuna Pálmasunnudag.**

**Íroknað prísin er:** Flogferð fram/aftur innivist á íbúð á einum Skenehouse.

**Ikki íroknað:** Ferðaavgjald kr. 512,- og útferðir.

Ferðin kann bíleggjast á øllum ferðaskrivstovum.

Atlantic Airways
Tel 333 900 Fax 333 990